LM-099/2023

Fylgiskjal 31

Til Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Mál nr. 23/25395

Tórshavn hin 20 august 2024

Við hesum sendur

Føroya Hundaførarafelag

Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum (hereftir nevnt UVMR)

Hoyringsskriv
í samband við uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

Innleiðandi verður upplýst, at Føroya Hundaførarafelag tekur undir við, at mann í Føroyum ger sítt til, at vit varðveita eina góða ferðavinnu. Hetta hoyringsskriv viðgerð bert ein minni lut av uppskotinum, sum viðvíkir virkseminum hjá Føroya Hundaførarafelag. Aðrar partar av uppskotinum til løgtingslóg tekur Føroya Hundaførarafelag í hesum hoyringsskrivi ikki støðu til.

Orsøkin, til at Føroya Hundaførarafelag sendir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hoyringsskriv, er tí at vit hava lagt til merkis, at tað er einstøk orðing í uppskotinum til løgtingslóg, sum ger seg rættuliga stórt inn á vanligt virksemi hjá okkara limum, og sum annars slett ikki hevur nakað við ferðavinnu at gera – Vit vóna, at talan er ein misskiljing, sum kann rættast.

Víst verður til § 4, stk. 4 í uppskotinum, sum sigur:
"Ikki er loyvt at hava hund við sær uttangarðs uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi."

Víst verður í hesum sambandi á, at limir í Føroya Hundaførarafelag faktisk í fleiri mannaminnir, og sum partur at føroysku mentanini, og sjálvsagt við loyvi frá festaranum, eru farin í hagan við tí endamáli at venja hundarnar hjá sær. Talan er so at siga um vanligt føroyskt mentunarvirksemi, sum hevur verið framt í gjøgnum nógv nógv ár.

Tað kom tí okkum ordiliga illa við, tá vit sóu hendan tekstin í lógaruppskotinum, sum so at siga setir defacto steðg fyri møguleikanum hjá okkara limum at fara í hagan við loyvi frá festara at venja hundin hjá sær. Sagt verður soleiðis, tí vit duga ikki at síggja, at nakar møguleiki fyri undantaki fyriliggur í lógaruppskotinum – slett onki men bert varandi stongsil.

Víst verður á, at hendan reglan fer at koma ómetliga illa við hjá okkara limum, og vit duga ikki at síggja, hví eitt tílíkt forboð skal setast fyri okkum í eini ferðavinnulóggávu, sum við eitt setir tílíkt forboð fyri

eini mentunarpraksis, sum hevur rigga fint í nógv mannaminnir. Okkara virksemi, við at fara í hagan at venja hund við loyvi frá festaranum, hevur ongantið gjørt seg inn á nakað ella nakran, og hevur rigga stak væl uttan trupulleikar. Mann kann á ein hátt spyrja, hví nakað, sum riggar fint, skal forbjóðast?

- Vit standa spyrjandi, eru ørkymlað og halda, at uppskotið fer ov langt í mun til, at uppskotið snýr seg um ferðavinnu og ikki virksemið hjá føroyskum borgarum í Føroya Hundaførarafelag, sum liva eitt vanligt lív samsvarandi føroyskari mentan í góðum samstarvi við festararnar.

Við hesum loyvir Føroya Hundaførarafelag sær tí at heita á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at broyta uppskotið soleiðis, at møguleiki eisini framyvir fer at vera hjá limum í Føroya Hundaførararfelag at fara í hagan í samstarvi við festararnar at venja hundar sínar. Hetta kann t.d. gerast við at skriva eina undantaksreglu inn í uppskotið - hendan kann t.d. eisini verða avmarkað til, at loyvi skal fyriliggja frá festara, og at viðkomandi skal vera limur í einum aktivum føroyskum hundaførarafelag við reglugerð, áðrenn mann kann fara í hagan at venja hund sín.

Til endans vilja vit fegin leggja áherslu á, at vit sera fegin vilja vera ein viðspælari hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í hesum viðurskiftunum, og at vit fegin koma á fund við ráðið ella aðrar mynduleikar undir landsstýrinum at greiða frá og nágreina okkara vitan og sjónarmið.

Vegna Føroya Hundaførararfelag

Fríðhild Debes
Forkvinna

Tlf. 291023
fridhild@fch.fo